# á Lágargarði



*Havnarkórið sett sum ikki einaferð sín frálíka dám á*



*Jóannes Fonsdal, prestur hevði jólaprædikuna*



*Hugsað varð eisini um tey, sum ikki hoyra*

– Síðsta uppgerðin vísti, at tað standa 176 fólk á bíðilista, og harav eru 39 visiterað til akuttum lista, greiðir Marjun Smith frá.

Av teimum 39 eru 23 dement. Tá ein er komin á akuttan bíðilista, kann roknast við, at bíðitíðin er eitt til tvey ár. Sambært Marjun Smith, so er tað einasta, ið hevði bøtt um støðuna, at vit fingu fleiri pláss til tey tyngstu til tey tyngstu røktartørvandi, tí tað er her, tey enda.

– Tað er ørkymlandi at hava ein so langan bíðilista. Vit fáa áheitanir frá ólukkuligum familjum næstan dagliga.

---

Nýggjárið verður annars hildið heilt stillisliga á Lágargarði. Búfólkini fáa ein góðan bita at eta, og um veðrið verður til tað, so verða bluss eisini tendrað úti í garðinum.



*Mong kend andlit vóru at síggja henda hugnaliga dagin á Lágargarði*



*Prestur heilsar uppá búfólk og teirra avvarandi*